| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 16. desember 2010 |
| Býráðsfundur nr. | 12/2010 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2010 tann 16. desember kl. 15.00 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 10. desember 2010 um innkalling til fundar, og broytingarskriv, dagfest 15. desember 2010 um framskundan til kl. 15.00.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Jann Toftegaard
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eidevig
Eyðun á Lakjuni
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Sonni á Horni

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 44/2010.**

**Ásetan av almennum býráðsfundum fyri 2011.**

Fuglafjaråar býráð hevur móttikið skriv frá borgarstjóranum, dagfest 07. desember 2010 við uppskoti um, at almennu býráðsfundirnir verða hildnir hesar hósdagar kl. 16.30 í býráðssalinum:
27. januar, 24. februar, 31. mars, 28. apríl, 26. mai, 23. juni, 25. august, 29. september, 27. oktober, 24. november og 15. desember.

**Avgerð:**
Samtykt varð at góðkenna uppskotið frá borgarstjóranum um almennu býráðsfundirnar fyri 2011. (9-0).

**Mál nr. 45/2010.**

**Viðvíkjandi fíggjan av eykajáttan til bólk 4 "Undirvísing" í A. Rakstri.**

Fuglafjarðar býráð hevur á fundi tann 25. november 2010 við 2. viðgerð samtykt at taka undir við tilmæli frá fíggjarnevndini um at veita eina eykajáttan upp á tilsamans kr. 625.000,00 til Fuglafjarðar skúla upp á ávíkavist kr. 595.000,00 til rakstrarstað 4232253010 konmto 140001 og kr. 30.000,00 til sama rakstrarstað konto 110001, hetta sambært § 41, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Sambært samtyktini verður eykajáttanin sambært § 41, stk. 2 í somu lóg fíggjað við flyting av kr. 625.000,00 úr bólki 7 Fuglafjarðar havn A. Rakstur rakstrarstað 7381453010 konto 160001 "Avseting viðlíkahald" til frammanfyri standandi rakstrarstøð.

Fyrsta viðgerð av eykajáttanini hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 28. oktober 2010 og beind til 2. og endaliga viðgerð 25. november 2010. Sostatt varð eykajáttanin soleiðis samtykt í verandi líki, at fíggingin verður tikin av útreiðslukonto nr. 160001 hjá Fuglafjarðar havn.

*Hesi viðurskifti bera við sær, at:*
- Avsetingin hjá Fuglafjarðar skúla rakstrarstaði 4232253010 verður hækkað úr kr. 2.636.500,00 upp í kr. 3.249.500,00.
- Avsetingin hjá Fuglafjarðar havn rakstrarstað 07381453010 konto 160001 verður lækkað úr kr. 1.400.000,00 niður í kr. 775.000,00.

Fyrisitingin hevur tann 29. november 2010 sent øllum býráðslimum upprit um fíggingina av nevndu eykajáttan, har havnanevndin á fundi í november 2010 hevur umrøtt spurningin um fíggingina av eykajáttanini ikki heldur skuldi verið tikin av Fuglafjarðar havn inntøkur, rakstrarstað 07381553010 konto 210001 "Søla av vørum og tænastum".

Í hesum sambandi er staðfest eina inntøku pr. 07. desember 2010 upp á kr. 7.092.235,00 móti meting í 2010 upp á kr. 5.450.000,00, so talan er um eina hækking upp á 1.642.235,00.

Eisini verður víst til, at so at siga eingin játtan er eftir á konto 160001 til keypi av anodum til havnina fyri umleið kr. 400.000,00 - kr. 500.000,00, tá ið bert umleið kr. 100.000,00 eru eftir av játtanini 160001, tá ið fíggingin av eykajáttanini til skúlan er broytt roknskaparliga.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 09. desember 2010 og mælir býráðnum til at broyta fíggingina av staðfestu eykajáttanini til Fuglafjarðar skúla upp á kr. 625.000,00, soleiðis at fíggingin sambært § 41, stk. 2 í kommunustýrislógini ístaðin verður tikin úr bólki 7, rakstrarstaði 07381553010 konto 210001 "Avseting søla av vørum og tænastum".

Sambært hesum verður avsetingin á konto 210001 hækkað við kr. 625.000,00 úr kr. 5.450.000,00 upp í kr. 6.075.000,00, meðan avsetingin á rakstrarstaði 07381553010 konto 160001 "Avseting viðlíkahald" framhaldandi verður kr. 1.400.000,00, sum er samsvarandi samtyktu fíggjarætlan kommununar fyri 2010.

**Avgerð:**
Tilmæli frá fíggjarnevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 46/2010.</u>**

**Viðvíkjandi fíggjan av eykajáttan til "undirvísingartilfar" hjá Fuglafjarðar skúla.**

Fuglafjarðar býráð hevur á fundi tann 25. november 2010 við 2. viðgerð samtykt at taka undir við tilmæli frá fíggjarnevndini um at veita eina eykajáttan upp á tilsamans kr. 50.000,00 til Fuglafjarðar skúla til rakstrarstað 4232253020 konto 140001, hetta sambært § 41, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Sambært samtyktini verður eykajáttanin sambært § 41, stk. 2 í somu lóg fíggjað við flyting av kr. 50.000,00 úr bólki 7 Fuglafjarðar havn A. Rakstur rakstrarstað 7381453010 konto 140001 "Avseting keyp vørur" til frammanfyri standandi rakstrarstað.

Fyrsta viðgerð av eykajáttanini hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 28. oktober 2010 og beind til 2. og endaliga viðgerð 25. november 2010. Sostatt varð eykajáttanin soleiðis samtykt í verandi líki, at fíggingin verður tikin av útreiðslukonto nr. 140001 hjá Fuglafjarðar havn.

*Hesi viðurskifti bera við sær, at:*

- Avsetingin hjá Fuglafjarðar skúla rakstrarstaði 4232253020 konto 140001 verður hækkað úr kr. 900.000,00 upp í kr. 950.000,00.
- Avsetingin hjá Fuglafjarðar havn rakstrarstað 07381453010 konto 140001 verður lækkað úr kr. 1.000.000,00 niður í kr. 950.000,00.

Fyrisitingin hevur tann 29. november 2010 sent øllum býráðslimum upprit um fíggingina av nevndu eykajáttan, har havnanevndin á fundi í november 2010 hevur umrøtt spurningin um fíggingina av eykajáttanini ikki heldur skuldi verið tikin av Fuglafjarðar havn inntøkur, rakstrarstað 07381553010 konto 210001 "Søla av vørum og tænastum".

Í hesum sambandi er staðfest eina inntøku pr. 07. desember 2010 upp á kr. 7.092.235,00 móti meting í 2010 upp á kr. 5.450.000,00, so talan er um eina hækking upp á 1.642.235,00.

Eisini verður víst til, at eingin játtan er eftir á konto 140001 til "Keyp av vørum og tænastum", og sambært uppgerð eru kr. 1.152.929,00 brúktar pr. dags dato., og tá er fíggingin av eykajáttanini til skúlan ikki broytt roknskaparliga.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 09. desember 2010 og mælir býráðnum til at broyta fíggingina av staðfestu eykajáttanini til Fuglafjarðar skúla upp á kr. 50.000,00, soleiðis at fíggingin sambært § 41, stk. 2 í kommunustýrislógini ístaðin verður tikin úr bólki 7, rakstrarstaði 07381553010 konto 210001 "Avseting søla av vørum og tænastum".

Sambært hesum verður avsetingin á konto 210001 hækkað við kr. 50.000,00 úr kr. 6.075.000,00 upp í kr. 6.125.000,00, meðan avsetingin á rakstrarstaði 07381553010 konto 140001 "Keyp av vørum og tæanastum" framhaldandi verður kr. 1.000.000,00, sum er samsvarandi samtyktu fíggjarætlan kommununar fyri 2010.

**Avgerð:**
Tilmæli frá fíggjarnevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 47/2010.</u>**

**Leingjan av leigusáttmála við KFUM § K skótarnar í Fuglafirði.**

Sosiala nevndin hevur sett ymski fram um eftir áheitan frá sosialu umsitingini og dagrøktini at leingja leigusáttmálan við KFUM og K skótarnar eitt ár aftrat frá 01. januar 2011 at rokna fram til 31. desember 2011.

Sosiala nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 17. november 2010 og heitir nevndin á býráðið um at taka undir við, at leigumálið við KFUM § K skótarnar fyri bygningin á matr. Nr. 338 og 339 í Fuglafirði verður longt 1 ár frá 01. januar 2011 at rokna fram til 31. desember 2011.

Annars verður víst til hjálagda uppskot frá fyrisitingini til ískoyti til leigusáttmálan.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá sosialu nevndini um at leingja leigumálið í 1 ár frá 01. januar 2011 at rokna fram til 31. desember 2011 og ískoytinum frá fyrisitingini. (8-0).

Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin var Kristina Toftegaard Larsen ikki á fundi vegna ógjegni.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 16.0 5.

Dánjal Vang

Jann Tofetgaard

Elisabeth D. Eidevig

Kristina Toftegaard Larsen

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus Midjord

Sonni á Horni

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen